DEILDIN FYRI ARBEIÐS-
OG ALMANNAHEILSU
SJÚKRAHÚSVERK FØROYA

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Avtala um samstarv millum

# Fróðskaparsetur Føroya

# og

# Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu

::::::::::::::::::::::
31. mars 2014

Innihaldsyvirlit

*§ 1. Avtalupartar ____ 3*

*§ 2. Endamál ____ 3*

*§ 3. Allýsingar ____ 3*

*§ 4. Skipan av tænastunum ____ 3*

*§ 5. Samstarvsøki ____ 3*

*§ 6. Stýrisbólkur ____ 3*

*§ 7. Fundarinnkalling ____ 3*

*§ 8. Fundarfrásøgn ____ 4*

*§ 9. Tíðarskeið og uppsøgn ____ 4*

*§ 10. Tagnarskylda og víðarilating av upplýsingum ____ 4*

*§ 11. Force majeure ____ 4*

*§ 12. Kontaktpersónar ____ 4*

*§ 13. Fráboðanir millum partarnar ____ 4*

*§ 14. Ábyrgd- og ábyrgdarfráskriving ____ 4*

*§ 15. Undirskriving og heildin av avtaluni ____ 5*

*Fylgiskjal 1 – Undirvísing á stovnunum/Felags starvsfólk ____ 6*

*Fylgiskjal 2 – Granskingarsamstarv og granskingarverkætlanir ____ 6*

*Fylgiskjal 3 – Tøknisamstarv – útgerð og KT ____ 6*

*Fylgiskjal 4 - Samstarv eftir- og víðariútbúgving ____ 6*

*Fylgiskjal 5 – Læknavísindalig grundútbúgving í Føroyum ____ 6*

# § 1. Avtalupartar

Fróðskaparsetur Føroya (Setrið)
J. C. Svabos gøta 14
FO-100 Tórshavn

og

Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu (DfAA)
Sjúkrahúsverk Føroya
Sigmundargøta 5
FO-110 Tórshavn

# § 2. Endamál

Endamálið við hesi avtalu er at menna heilsuvísindaliga gransking, menning og útbúgving í Føroyum. Avtalan skal skipa samstarvið millum DfAA og Setrið við greiðum ásetingum viðvíkjandi innihaldi og mannagongdum og verða ein karmur um víðari menning av samstarvinum.

# § 3. Allýsingar

Ongar fyri fyrst.

# § 4. Skipan av tænastunum

DfAA og Setrið skulu tryggja hvør sær, at starvsfólk, ið fáast við at veita tænastur til hin partin, hava neyðugu útbúgvingarnar/førleikarnar, eru skikkað og regluliga fáa dagført sína vitan, til tess at kunna veita tænastur á einum nøktandi stigi.

# § 5. Samstarvsøki

Í fylgiskjølunum 1-5 eru fyri ymisku samstarvsøkini serstakar ásetingar, undir hesum; treytir, møgulig gjøld, mannagongdir og annað viðkomandi.

# § 6. Stýrisbólkur

Yvirlæknin á DfAA og rektarin á Setrinum saman við dekaninum fyri megindeildina fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi møtast í minsta lagi 2 ferðir árliga til at gera støðuna upp viðvíkjandi samstarvinum og meta um tørvin á dagføringum av avtaluni og tilhoyrandi fylgiskjølum. Fundir verða avtalaðir á hvørjum fundi 12 mánaðir fram. Um tørvur er á tí, kann hvør parturin biðja um at fáa fund við 14 daga varningi. Um ikki annað verður avtalað, skiftast fundirnir ímillum at vera á DfAA og á Setrinum. Hvør parturin avger sjálvur, hvussu nógv fólk møta vegna partin, undir hesum, hvørji fólk frá fyrisiting, megindeildum, kliniskari deild v.m.

# § 7. Fundarinnkalling

Innkallandi parturin sendir uppskot til fundarskrá í minsta lagi 14 dagar áðrenn fundin.

*Stk. 2.* Við fundarinnkallingini skal fylgja ein dagsskrá, sum so vítt møguligt skal tilskila, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum, og hjálagt skal vera tað tilfar, sum er neyðugt til tess at viðgera málini.
*Stk. 3.* Føst punkt á dagsskránni fyri fundir í stýrisbólkinum eru hesi:
1) Partarnir kunna um týðandi viðurskiftir og hendingar í sambandi við samstarvið og avtaluna.
2) Uppskot til evnir. Partarnir kunnu koma við málum, sum skulu viðgerast.

## § 8. Fundarfrásøgn

Eftir hvønn fund ger tann parturin, har fundurin hevur verið, fundarfrásøgn, har tilskilað verður:
1) Hvørji vóru á fundinum.
2) Innihaldið á fundinum í høvuðsheitum og niðurstøður í teimum einstøku málunum.
*Stk. 2.* Fundarfrásøgnin skal vera tøk í seinasta lagi 7 dagar eftir fundin. Broytingar og rættingar til fundarfrásøgnina skulu sendast pørtunum, soleiðis at fundarfrásøgnin kann góðkennast í seinasta lagi 14 dagar eftir fundin.

## § 9. Tíðarskeið og uppsøgn

Henda avtala er galdandi frá 1. apríl 2014 til og við 31. desember 2017. Partarnir kunnu hvør sær siga avtaluna upp, sum heild ella fylgiskjøl, við eini freist upp á 12 mánaðir.

## § 10. Tagnarskylda og víðarilating av upplýsingum

Víst verður til galdandi reglur innan tað almenna herundir persónsupplýsingalógina, fyrisitingarlógina v.m.

## § 11. Force majeure

Ongin partur kann ábyrgdast fyri ikki at uppfylla avtaluna til tíðina, tá atvoldin er eitt hvørt, sum partarnir ikki hava nakra ávirkan á, eitt nú, men ikki avmarkað til, ódnarveður, vatnflóð, eldsbruni, kríggj, verkfall ella verkbann.

## § 12. Kontaktpersónar

Samskiftispersónar viðvíkjandi yvirskipaðum viðurskiftum í hesi avtaluni eru yvirlæknin á DfAA, rektarin á Setrinum og dekanurin á megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi á Setrinum. Samskiftispersónar fyri onnur viðurskifti verða avtalað í einstøku fylgiskjølunum.

## § 13. Fráboðanir millum partarnar

Fráboðanir millum partarnar viðvíkjandi týðandi viðurskiftum eftir hesi avtalu skulu verða staðfestar við skrivligum samskifti við t-posti, har avsendarin biður um váttan fyri móttøku.

## § 14. Ábyrgd- og ábyrgdarfráskriving

Hvør sáttmálapartur ber ábyrgd av egnum starvsfólki viðvíkjandi trygging o.s.fr.

## § 15. Undirskriving og heildin av avtaluni

Henda avtala verður undirskrivað í tveimum eintøkum, eitt til hvønn partin. Avtalan við tilhoyrandi fylgiskjølum lýsir treytirnar, ið eru avtalaðar millum partarnar og skulu møgulig ískoyti til avtaluna verða dagfest og undirskrivað í tveimum eintøkum av pørtunum í avtaluni, eitt eintak til hvønn partin.

**Fróðskaparsetur Føroya    Dato**

**Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu    Dato**

# Fylgiskjal 1 – Undirvísing á stovnunum/Felags starvsfólk

DfAA hevur skyldu til at virka við til, at starvsfólk á DfAA eftir nærri avtalu kunnu virka sum undirvísarar á Setrinum.

Farið verður undir eina tilgongd viðv. at vísindafólk í starvi á DfAA verða knýtt at Setrinum sum adjungerað vísindafólk, ávikavist lektari ella professari.

Allar slíkar setanir verða gjørdar tíðaravmarkaðar. Fyri DfAA er málið at tryggja integratión av gransking og menning í kliniska virkseminum.

# Fylgiskjal 2 – Granskingarsamstarv og granskingarverkætlanir

Megindeildin fyri náttúru- og heilsuvísindi (MNH) á Setrinum og DfAA eru meginsamskiftisfelagar fyri at menna felags verkætlanir til frama fyri heilsuvísindaliga gransking við m.a. atliti til at tryggja granskingargrundaða undirvísing og menning á stovnunum. Dekanurin á MNH og yvirlæknin á DfAA skipa eitt samstarvsforum við 2 umboðum hvør fyri at menna økið.

Setrið hevur lesandi í KT-frøði og serkøn vísindastarvsfólk í hagfrøði. Partarnir miðja ímóti, at lesandi kunnu fáa uppgávur frá DfAA at loysa við atliti til heilsuhagfrøði, epidemiologi, heilsubúskap v.m. DfAA setir dátusavn til taks eftir nærri treytum og verkætlanarlýsingum. Somuleiðis kann DfAA leita sær hjálp og vegleiðing frá serkønum í hagfrøði á Setrinum. Serlig atlit mugu takast til at verja viðkvæmar persónsupplýsingar. Niðurstøður víðvíkjandi greining av tilfari, sum er fingið til vega á DfAA, skulu vera góðkendar af DfAA, áðrenn møguliga almannakunngerðing. Teldutøkt tilfar frá DfAA um persónar skal fyribeinast, eftir at tað er brúkt til avtalaðu greiningina, uttan so at onnur avtala er gjørd.

# Fylgiskjal 3 – Tøknisamstarv – útgerð og KT

DfAA og Setrið ynskja at samstarva innan gagnnýtslu av tøkniligari útgerð og KT-skipanum, har hetta er til gagns fyri báðar partar. Ein neyvari lýsing av hesum økinum skal gerast, tá hendan avtalan hevur fingið gildi.

# Fylgiskjal 4 - Samstarv eftir- og víðariútbúgving

Tá DfAA og/ella Setrið skipa fyri innanhýsis skeiðum og undirvísing eigur at verða mett um, um hesi eisini kunnu bjóðast hinum. Avtalað verður frá ferð til ferð, hvørt hetta er uttan ella móti viðurlagi.

# Fylgiskjal 5 – Læknavísindalig grundútbúgving í Føroyum

DfAA og Setrið seta arbeiðsbólk at lýsa, hvussu ein grundútbúgving (BSc) í læknavísindum kann skipast í Føroyum, og hvussu framhaldsútbúgvingin kann tryggjast í samstarvi við útlendsk universitet. Miðað verður eftir, at lýsingin verður latin stýrisbólkinum í november 2014.